# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Køkur, kaffi og tungmálmur

**– Tað er ikki nógv rokk'n'roll við smákøkum, segði ein við meg, meðan við stóðu har við okkara kaffikoppum og smákøkum og lurtaðu eftir tunga málminum hjá Sic**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




Bólkurin hevði í gjárkvøldið boðið til útgávuveitslu í REX, men tá eg kom á dyrnar á REX var stongt og myrkt. Hóast einki stóð nakrastaðni um, at tiltakið var flutt, so skilti eg á mongdini av ungum svartklæddum fólki við makeup, ið vóru á veg inn í Eclipse, at tiltakið var flutt úr náttklubbanum til diskotekið hjá byin.fo.

Inni í Eclipse var heilt nógv fólk. Hesi fingu Sic lagkaku, Sic smákøkur, kaffi og djús. Harumframt var møguligt at keypa Sic øl. Hetta vaks eitt sindur um rokk´n´roll trúvirðið. Men kundi ikki fora kvøldinum í at gerast sera hugnaligt.

Vit sluppu at hoyra bólkin spæla nøkur løg av fløguni. Teir spældu í trimum umførum. Tað var eitt frískligt innslag, at hoyra livandi tónleik, men samstundis taldu ringu ljóðviðurskifini nokkso fitt niður. Fyri nakrar av trúgvastu Sic fjeppararunum, var hetta eitt kærkomið høvi at pikka korn. Tað er altíð eitt sindur løgið, tá ein bólkur framførur live í sambandi við fløguútgávu, tí meðan fløgan er úrslit av fínpussan og at kýnt hevur verið fyri henni, so er ein konsert ikki brýnd og hetta kann á onkran hátt tykjast at vera í andsøgn við júst hetta at leggja fløguna fram, serliga við somikið ringum ljóði sum í gjár. Fløgan varð millum framførslurnar spæld í annlegginum, fyrsta inntrykkið av henni var sera jaligt. Nógv nýttu høvið at ogna sær fløgur, t-troyggir ella plakatir hjá Sic.

Á stórskíggja kunngjørdi Sic, at bólkurin í næstum fer at geva út DVD, har fyrsta sjónbandalagið hjá Sic verður á síggja, umframt upptøkur frá framleiðsluni av sjónbandalagnum og av fløguni, stutt sagt alt um sic. DVD'in verður gjørt í samstarvi við filmsmiðin Eyðun Müller Thomsen.

Eitt lýsingarbrot fyri DVD'ini varð spælt á stórskíggja, men tíanverri vóru onkrir tøkniligir trupuleikar, soleiðis at spæling av brotinum var nokkso hakkut.





JARÐFEINGI
FAROESE EARTH AND ENERGY DIRECTORATE

## Trý áhugaverd størv á Jarðfeingi

**Hevur tú áhuga í orkupolitikki, jarðfrøði ella náttúrulandafrøði?**

JARÐFEINGI søkir eftir trimum starvsfólkum at byrja skjótast til ber.
Arbeiðið á stovninum er fjøltáttað. Vit samstarva og samskifta við nógv viðskiftafólk, myndugleikar, stovnar og vísindafólk bæði her heima og í útlandinum. Dentur verður í øllum trimum størvunum lagdur á førleika at arbeiða sjálvstøðugt og góð evni at samskifta og samstarva, umframt góðan førleika til málsliga og skrivliga at samskifta á norðurlendskum og enskum máli.

### VERKFRØÐINGUR

Starvið
Í samband við at meira miðvíst fer at verða arbeitt við orkupolitiskum átøkum, sum hava til endamáls at økja nýtsluna av varandi orkukeldum og at seta orkusparandi tiltøk í verk, verður søkt eftir starvsfólki við útbúgving sum verkfrøðingur ella líknandi.

Talan er um nýtt starv á loyvis- og orkudeildini, har tú í stóran mun sjálv/ur fært ávirkan á og ábyrgd fyri at menna starvsøkið.

Ætlanin er eisini, at tú skalt seta teg inn í arbeiði við heilsu-, trygdar- og umhvørvisviðurskiftum innan kolvetnisleiting.

Útbúgving og royndir
Tú skalt hava prógv frá hægri lærustovni umframt viðkomandi royndir. Harumframt er ynskiligt at tú hevur førleika og áhuga fyri at arbeiða innan systemanalysu og matematiskari modellering í samband við framleiðslu og veiting av ravmagni.

### JARÐFRØÐINGUR

Starvið
Starvið er knýtt at Landgrunsverkætlanini, har Jarðfeingi í samstarvi við onnur fær til vegar og fyrireikar próvførsluna, sum skal leggjast fyri ST í tilknýti til áseting av ytra markinum á landgrunninum uttan fyri 200 fjórðingar.

Uppgávan fevnir millum annað um ymiskar greinar av havjarðfrøði, eitt nú at tulka og í aðrar mátar at viðgera seismiskar og aðrar jarðalisfrøðiligar dátur og at skipa tær í ein dátugrunn. Arbeitt verður partvíst í toymum, har vísindafólk frá fleiri stovnum samstarva um ávísar lutir av samlaðu verkætlanini. Í hesum sambandi verður ferðast uttanlands nakrar ferðir um árið.

Starvstíðin er treytað av serligari játtan til verkætlanina, sum væntandi tekur nøkur ár.

Útbúgving og royndir
Tú skalt sum minstamark hava kandidatsprógv frá hægri lærustovni umframt førleika og royndir innan nýtslu av teldutøkni í sambandi við greining av jarðfrøðiligum spurningum.

### NÁTTÚRULANDAFRØÐINGUR

Starvið
Starvið er knýtt at Jarðkunningardeildini. Arbeiðsuppgávurnar fevna um rannsóknararbeiði og kortlegging í fakøkjunum landslag, jørð, jarðvandar og veðurlag.

Í hesum nýggja starvi verður serligur dentur lagdur á at kanna erosión og aðrar jarðvandar í Føroyum, soleiðis at komandi tiltøk og tilbúgving kunnu grundast á ítøkiliga vitan um vandar fyri t.d. skriðulopum og skalvalopum.

Útbúgving og royndir
Tú skalt sum minstamark hava kandidatsprógv frá hægri lærustovni, og tú skalt helst eisini hava førleika og royndir í nýtslu av telduamboðum til GIS-kortlegging og onnur náttúrulandafrøðilig evnir.

### LØNAR- OG SETANARTREYTIR

Størvini verða sett sambært sáttmálar millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfeløg. Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til JARÐFEINGI á telefon 357000 ella við telduposti til jarðfeingi@jarðfeingi.fo

### UMSÓKNIR

Umsóknir við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skulu vera Jarðfeingi í hendi í seinasta lagi 15. mars 2007.
Adressan er: JARÐFEINGI, Brekkutún 1, Postboks 3059, FO-110 Tórshavn

JARÐFEINGI er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Endamál stovnsins er at fyrisita, granska, ráðgeva og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfeingi umfatandi hesar høvuðspartar: kolvetni, orku og jarðfrøðilig náttúruvirði.

Høvuðsuppgávurnar á Jarðfeingi eru:
a) Kolvetnismál, og sum partur av hesum at fyrisita lóggávu innan leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.
b) Orkumál, og sum partur av hesum at fyrisita lóggávu innan framleiðslu, flutning og veiting av orku.
c) Jarðfrøðiligar og náttúrulandafrøðiligar uppgávur innan gransking, ráðgeving, savnsvirksemi og undirvísing.

WWW.JARDFEINGI.FO